# USA fyrireikað til álop

Amerikanski verjumálaráðharrin, Robert Gates, ásannar, at amerikanska stjórnin kennir seg ikki heilt trygga, nú tað er komið fram, at Norðurkorea kann finna uppá at søkja at Hawaii-oyggjunum við einari ella fleiri rakettum. Tí hevur amerikanska verjan sett tiltøk í verk, sum skulu forða einum tílíkum álopi, sigur verjumálaráðharrin. Millum annað hevur verjan fingið heimild til at seta ta serligu THAD-rakettverjuskipanina upp á Hawaii-oyggjunum umframt nýggja radaraútgerð. Robert Gates



# Liðugt at leingja flogvøll um tvey ár

Kringvarp.fo skrivar, at hóast nevndin í Vága floghavn ikki enn veit, hvussu nógv flogvøllurin verður longdur, væntar hon longu nú, at arbeiðið verður liðugt á sumri í 2011. Um mánaðaskiftið august/ septembur fer nevndin í Vága Floghavn at gera av, hvussu nógv flogvøllurin skal leingjast. Tá vera feløgini, sum gera ætlan um flogvøllin, liðug við sítt arbeiði. Dávur Reinert Hansen, forstjóri í Vága Floghavn, sigur, at feløgini, sum gera ætlanina, kanna fleiri møguleikar, so flogvøllurin kann leingjast úr verandi 1.250 metrum í 1.800 metrar. Vága Floghavn varð yvirtikin 30. apríl í 2007.

# Skal skriva barnabók um Aung San Suu Kyi

**Fyrsta dagin fer fyrrverandi norski forsætisráðharrin Kjell Magne Bondevik í summarfrí, men hetta summarið verður ikki sum hini. Tí í summar skal hann brúka frítíðina til at skriva eina barnabók um Aung San Suu Kyi**

BÓKAÚTGÁVA
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Sjálvt hjá einum royndum politikara og fyrrverandi forsætisráðharra tekur tað meiri enn eina summarferiu at skriva eina bók. Kjell Magne Bondevik væntar kortini, at hann verður liðugur at skriva eina ferð í heyst, og at bókin kann koma í bókabúðirnar í november.

Bókin, sum er ætlað børnum í átta til tólv ára aldri, kemur afturat einari røð av bókum, sum eitt norskt forlag hevur givið út, og sum hava tað til felags, at tær snúgva seg um kendar einstaklingar. Bøkurnar, sum higartil eru komnar út, eru um Barack Obama, Miley Cyrus, Bill Gates og Alexander Rybak. Nú hevur forlagið so biðið Kjell Magne Bondevik skriva eina bók um Aung San Suu Kyi.

### Avbjóðing

Kjell Magne Bondevik hevur verið virkin í norskum politikki í mong ár, og sum politikari hevði hann millum annað stóran áhuga fyri friðarroyndum og mannarættindum. Tað kom tí ikki óvart á nakran, tá hann fyri nøkrum árum síðani legði lunnar undir ein stovn, sum júst virkar fyri friði og mannarættindum.

Sum politikari hevur hann skrivað nógv, men hetta er fyrstu ferð, at hann skal royna at skriva til lesarar, sum eru millum 8 og 12 ár.

-Eg veit eitt sindur um Aung San Suu Kyi, so sjálvt evnið er eingin trupulleiki. Harafturat havi eg skrivað onkrar bøkur fyrr, men avbjóðingin hesa ferð er at skriva, so børn skilja tað, og her má eg biðja um góð ráð frá ráðgevum, sigur tann komandi barnabókarithøvundurin við Aftenposten.

Kjell Magne Bondevik leggur afturat, at kanska fer hann at brúka sítt átta ára gamla abbabarn sum ein av ráðgevunum, og hann væntar eisini at fáa ráð frá næstringum, vinum og kenningum. Tí hesa uppgávuna klárar hann ikki uttan hjálp, ásannar hann.

### Hevur hitt hana

Fyrrverandi forsætisráðharrin dylur ikke fyri, at hann játtaði at átaka sær uppgávuna at skriva bókina, tí hann heldur Aung San Suu Kyi vera ein týdningarmiklan persón at skriva um, og at norsk børn eiga at fáa møguleikan at kunna seg um søgu hennara.

-Hon er í einum støðugum stríði fyri frælsi og fólkaræði og hevur sitið so leingi í varðhaldi, at eg vænti, at søga hennara kann vera spennandi hjá børnum at lesa, sigur Kjell Magne Bondevik. Hann viðgongur, at hansara hjarta brennur fyri Burma og frælsisstríðnum hjá Aung San Suu Kyi, og so hevur hann tann fyrimun fram um mong onnur, at hann hevur hitt hana. Tað var í januar í 1997.

Hann ætlar sær at brúka fundin teirra millum sum støði undir bókini. Spurdur, um hann ætlar at brúka seg sjálvan í bókini, svarar hann játtandi.

-Forlagið vil hava, at eg skal seta sín persónliga dám á bókina. Hvør veit, kanska fer tað at gera bókina betri.





*Her er Kjell Magne Bondevik til eitt tiltak hjá norsku barnanevndini. Á tryggjuni er mynd av Aung San Suu Kyi, sum hann nú skal skriva eina barnabók um*
(Mynd: Scanpix)

### Støðan spent

Herfyri varð Aung San Suu Kyi flutt úr húsavarðhaldinum og sett í eitt fongsul ístaðin fyri. Støðan er sera ógreið og spent, og mangt kann henda teir næstu mánaðirnar. Men forlagið hevur lovað Kjell Magne Bondevik, at hann fær møguleika at broyta bókina, skuldu okkurt serligt borist á, áðrenn bókin fer til prentingar.

Vidar Kvalshaug, sum er stjóri á forlagnum, ið gevur út bøkurnar um kendar einstaklingar, sigur, at forlagið fer at halda fram við hesari bókarøðini. Hann letur væl at søluni, og hann væntar eisini, at fólk fara at vísa bókini um Aung San Suu Kyi áhuga. Hann er eisini fegin um at hava fingið Kjell Magne Bondevik at skriva bókina.

-Eingin her í landinum er betur egnaður at siga søguna um hana, sigur Vidar Kvalæshaug við Aftenposten.

# Heiðra »Orðabókini«

**Í sambandi við at Jóhan Hendrik W. Poulsen, professari í málfrøði, fyllir 75 í morgin, verður almen hátíðarløta á Læraraskúlanum**

HÁTÍÐARLØTA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í sambandi við at Jóhan Hendrik W. Poulsen, professari í málfrøði, verður 75 ár leygardagin 20. juni, verður almen hátíðarhald í Lærararskúlahøllini, har hann fær handað heiðursrit, sum forlagið Sprotin gevur út. Í heiðursritinum Orðabókin eru savnaðar allar tær orðabókarsendingar, Jóhan Hendrik W. Poulsen hevði í Útvarpi Føroya árini 1969-1993 við heitinum Orðabókin.



*Málfrøðingurin Jóhan Hendrik W. Poulsen verður nú heiðraður við heiðursritinum »Orðabókin«, har allar hansara orðabókasendingar í Útvarpinum eru savnaðar*

Fremst í heiðursritinum er ein kvøðulisti við nøvnum á teimum, sum hava ynskt at senda málfrøðinginum eina heilsan. Hesi fáa nú Orðabókina fyri serprís við áskrift. Eisini onnur hava høvi at ogna sær bókina og fáa áskrift í hana á hátíðarløtuni leygardagin.

Tað verður Anfinnur Johansen, lektari á Føroyamálsdeildini, sum fer at handa Jóhan Hendriki W. Poulsen heiðursritið. Síðani verða røður og sangur á skránni, umframt at gestirnir eisini fáa ábit og okkurt at drekka.

Hátíðarhaldið byrjar klokkan 15.

### Minnisvarði

Í skrivi frá forlagnum verður víst á, at úr at kalla hvørji bygd í Føroyum vóru tað fólk, enntá fleiri, sum skrivaðu til sendingina Orðabókina øll tey árini, hon var send. Fleiri teirra eru ikki millum okkum longur, men við eini tílíkari útgávu kunnu vit reisa teimum og øllum, sum hava sent Orðabókini tilfar, ein minnisvarða.

Eyðkent fyri meginpartin av hesum heimildarfólkum er, at tey hava lítlan skúlagang, men við teirri ómetaligu vitan um dagsins viðurskifti bæði á sjógvi og landi hava tey verið við til at bjarga nógvum av tí siðsøguliga mentanararvi, ið tey numu av forfedrum sínum. Við at fáa alt hetta tilfar á prent kunnu bæði eldri og komandi ættarlið fáa lut í allari hesari vitan um mentanar- og siðsøgu okkara gjøgnum øldir, og Sprotin vil við hesi útgávu eisini heiðra Jóhan Hendrik W. Poulsen á 75 ára føðingardegi hansara.

### Skrá fyri hátíðarhaldið

Kór við Ólavi Hátún syngur
Jonhard Mikkelsen býður fólki vælkomnum
Anfinnur Johansen heldur røðu og handar Jóhan Hendriki W. Poulsen heiðursritið
Kór við Ólavi Hátún syngur
Turið Sigurðardóttir heldur røðu
Hanus Kamban heldur røðu
Kór við Ólavi Hátún syngur
Martin Næs heldur røðu
Signar á Brúnni heldur røðu
Felagssangur